## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag og leygardagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av eystri og landnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 8 og 12 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Lot til andøvsgul av norði og útnyrðingi og ælingur, partvís vátakavi. Hitin millum 2 og 5 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landnyrðingi og vátaslettings- ella kavaælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum frostmarkið og +4 stig.

# Heystardagur

**Luftin og fjøllini draga til sín hesar kláru, reinu heystardagarnar. Tær leiðist við at sita inni, og ikki stendst í móti tráðanini eftir at sleppa í hagan**

HEYST
*Edvard Joensen*



Heystardagurin heiðursklári, fagrari eingin er um vári, tekur Mikkjal á Ryggi til.

Og sannast má, at hóast fyrstu várdagarnir rættiliga fáa lív í alt, sum ligið hevur í dvala um veturin, hava hesir kláru heystardagarnir ikki minni gandakenda atdráttarmegi í sær.

Hesa megi, sum fær fólk at reisast úr stólinum og bara ganga og tráða eftir at sleppa út.

Út til frælsið at gera tað, ein vil. Ganga í haganum. Anda reinu luftina, sum fer svíðandi gjøgnum barkan, í seg. Nema og síggja nýggjar lutir, sum knappliga vísa seg so klárir, hóast tú fleiri ferðir í summar hevur gingið júst hesa leiðina og ivaleyst ofta sæð teir, uttan at hava givið teimum ans.

Men nú gulnar gras í dali, og líðirnar brúnka, har fyrr var grønt og albeitt. Á bø er komið lamb og ær, tí kalt er millum hæddir.

Veturnætur eru farnar, og krovini eru við at stadna í hjallinum. Fjalldagarnir fara at fækka. Men tað eigur ikki at halda nøkrum aftur í at fara í hagan.

Tað er at taka stavarnar - nú er tað vorðið so umhildið at ganga við sonevndu gongustavunum, sum eisini eru góðir - og halda í brekkuna.

Tann, sum hevur eygu og oyru í rímiligum standi, finnur hvørja ferð okkurt nýtt, sum vekur undran og áhuga.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 0 |
| Nuuk | 0 |
| Qaqortoq | 3 |
| Ammassalik | 0 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 7 |
| Seyðisfjørður | 9 |
| Tórshavn | 10 |
| Lerwick | 10 |
| Aberdeen | 12 |
| London | 15 |
| Tromsø | 8 |
| Bergen | 12 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 9 |
| Keypmannah. | 10 |
| Helsinki | 7 |
| Moskva | 6 |
| Berlin | 11 |
| Warzawa | 8 |
| Kiev | 7 |
| Bukarest | 8 |
| Paris | 12 |
| Madrid | 16 |
| Róm | 18 |
| Malorca | 23 |
| Athen | 19 |
| Malta | 23 |
| Tunis | 24 |
| Beijing | 21 |
| New Dehli | 26 |
| Bangkok | 34 |
| Jakarta | 33 |
| Sydney | 36 |
| New York | 20 |
| Miami | 27 |
| Los Angeles | 21 |
| Meksikobýur | 18 |
| Panama | – |
| La Paz | 14 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 15 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 991 hPa. yviri á Suðurlandinum grynnist. Eitt annað lágtrýst, 992 hPa. yvir Ermasundi fer spakuliga norðureftir.




Lágtrýstið yvir Bretsku Oyggjunum stendur mestsum í stað. Hátrýstið yvir Grønlandsfjørðinum fer spakuliga eystureftir.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 13/10 kl. 06[00]–14/10. 06 [00]. Hitin í gjár: 9,1°
Minsti hiti máldur í okt.: ÷4,0° - Mesti hiti máldur í okt.: 18,4°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 6,0 mm –mált frá 13/10 kl. 06 [00]–14/10 kl. 06 [00]
Avfallið higartil í oktober: 72,8 mm


I EINUM SAMFELAG
HAR TEY VEIKASTU
HAVA TAÐ GOTT,
HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI


## VESTFALLSKYRRINDI

14. oktober: Tendring
17. oktober: Mánin næstur jørðini
20. oktober: Fyrra kvarter

Kelda. Álmanakkin 2004

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 15. okt | 08.01 | 20.23 | 07.01 | 19.23 | 07.16 | 19.38 | 10.01 | 22.23 | 11.01 | 23.23 | 06.16 | 18.38 | 05.16 | 17.38 | 08.16 | 20.38 | 09.16 | 21.38 | 07.46 | 20.08 | 09.01 | 21.23 |
| 16. okt | 08.46 | 21.10 | 07.46 | 20.10 | 08.01 | 20.25 | 10.46 | 23.10 | 11.46 | — | 07.01 | 19.25 | 06.01 | 18.25 | 09.01 | 21.25 | 10.01 | 22.25 | 08.31 | 20.55 | 09.46 | 22.10 |
| 17. okt | 09.36 | 22.02 | 08.36 | 21.02 | 08.51 | 21.17 | 11.36 | — | 00.10 | 12.36 | 07.51 | 20.17 | 06.51 | 19.17 | 09.51 | 22.17 | 10.51 | 23.17 | 09.21 | 21.47 | 10.36 | 23.02 |
| 18. okt | 10.31 | 23.00 | 09.31 | 22.00 | 09.46 | 22.15 | 00.02 | 12.31 | 01.02 | 13.31 | 08.46 | 21.15 | 07.46 | 20.15 | 10.46 | 23.15 | 11.46 | — | 10.16 | 22.45 | 11.31 | — |

5 707265 100050 >